

*Hósvíkar skúli fær neyðuga útbygging*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

# Meiri rúm til skúlan

**Í hesum døgum verður arbeitt við at fyrireika eina víðkan av bygdarskúlanum í Hósvík**

SKÚLI
*Snorri Brend*

**Hósvík:** Við útbyggingini fáa næmingarnir tríggjar skúlastovur aftrat, eins og góðar umstøður, til eitt nú bókasavn og lærarar.

- Umstøðurnar hava verið heldur trongligar. Og tí gleða vit okkum til at fáa betri hølisviðurskifti, tá skúlaárið 2008/09 byrjar, sigur skúlaleiðarin, Eydna Midjord í Hósvík við Sosialin.

### "Ung" bygd

Í dag hevur Hósvíkar skúli tvær vanligar skúlastovur og eina minni, umframt at loftið í bygdarhúsinum verður lutvíst brúkt til skúlastovu.

At hetta arbeiðið verður gjørt kemur ikki av ongum. Staðfestast kann, at Hósvík er ein "ung" bygd og sum støðugt veksur: Í 1995 vóru 215 fólk í Hósvík, men í mars mánaði í ár var talið vaksið upp í 302.

Í dag eru 44 næmingar í skúlanum, og talið verður helst tað sama eftir summarfrítíðina.

Men í bygdini eru rættiliga nógv børn undir skúlaaldur, og sum skilst standa fólk á bíðilista til at fáa grundøki í Hósvík.

## Atlants Kolvetni vert eina milliard

OLJUFELØG
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum gjørdi eitt rimmar hál í morgun, og setti harvið eisini eitt met, tá kursurin á partabrøvunum kom upp á 950 krónur. Hetta eru sera góð tíðindi fyri teir mongu føroyingar, sum hava sett pengar í felagið. Høgi kursurin hevur við sær, at marknaðarvirðið fyri felagið fyri fyrstu ferð í søguni er omanfyri eina milliard krónur. Fríggjadagin varð kursurin 840 kr., so í vikuskiftinum hevur kursurin tikið ordiligt dykáseg. Uppá fyrispurning hvør orsøkin kann vera hesa knappligu hækking verður sagt frá Atlants Kolvetni í Havn, at tey gera ikki viðmerkingar til slíkar hækkingar. Sum skilst fór rokniskapurin fyri fyrsta ársfjórðing út um vikuskiftið. Annars bórust tey tíðindi í útvarpinum og á Portalinum í vikuskiftinum, at føroyska oljufelagið í farnu viku fór undir ta fyrstu av trimum leitiboringum í einum av loyvunum á bretskum øki.

Í dag eru umleið 3700 partaeigarar í Atlantic Petroleum, harav umleið 66% liggja í Føroyum. Hinir partaeigarnir eru útlendingar og føroyingar í útlandinum.

## Tveir skúlar í sóknini 100 ár

Hvítusunnudag verður hátíðarhald í Kvívíkar kommunu í samband við, at í ár eru liðin 100 ár síðani at skúlarnir í Leynum og Kvívík vórðu bygdir.

**Kvívíkar sókn:** Hátíðarhaldið byrjar við kirkjugongd í Kvívík kl. 12, har Marjun Bæk, prestur, prædikar og Kingo-sangur verður at hoyra.

Framsýning við gomlum myndum og skúlabókum opnar í Kvívíkar skúla kl. 14 og kl. 15 byrjar hugleiðingarløta, har skúlaleiðarin Bjarni Heinesen býður vælkomin, áðrenn Viggo Johannesen fer at greiða frá um viðurskiftini, tá skúlin í Kvívík varð bygdur.

Her fara somuleiðis Katrin Dahl at greiða frá um skúlagongd í 1940-unum og Heidi Petersen hugleiðir um 1960-árini. Skúlabørn og musikkskúlabørn syngja og spæla.

Í Leynum verður tikið ímóti frá kl. 16.30 á skúlaøkinum, har Ova-teltið úr Nólsoy verður sett upp. Í skúlanum verður framsýning av m.a. gomlum myndum. Kl. 17 bjóðar Soffi Egholm saman við skúlabørnum vælkomin til heimabakaðar køkur og kaffi. Aftaná fer Anfinn Setberg at hugleiða, og síðani fer Jens Pauli í Dali at greiða frá skúlasøguna í Leynum, Skæling og á Válinum. Eisini fara Anna Hanusson og Bergtóra Blástein at fortelja um upplivingar frá skúlaárunum í Leynum og á Válinum.

Harumframt verður felagssangur og skúlabørnini fara at syngja. Aftaná hetta verður náttúrði.

**sb.**

# Dropar í Århus



**Barnakórið Dropar hevur um vikuskiftið havt tvær konsertir í Århus**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á lið 100 áhoyrar lýddu á, og fólk fingu eina hugnaliga løtu við føroysum og útlendskum tilfari, tá Dropar vóru á palli í Musikhuset í Århus fríggjdagin. . Dropakórið sang saman við donskum barnakórið, eins og kórini sungu hvør sær.

Dropar eru í hesum døgum á konsertferð í Århus. Vitjanin er komin í lag sum ein menningarætlan hjá einum barnakóri í Århus og Dropum. Sunnudagin høvdu tey konsert í Fredrikskirken uttanfyri Århus

Um 14 dagar kemur danska barnakórið til Føroya at hava konsertir saman við Dropum.